# NEATA festivalurin í myndum

## Koldt

Níggju fólk søkja skýli í einum kjallara tá sólin er sløknað. Tey hava mat, vatn og teppir. Í fyrstuni eru tey optimistisk, men eftir nakrar dagar, tá maturin er við at vera uppi, vatni frystir í rørunum og streymurin verður slitin, byrja tey hvør sítt stríð fyri at yvirliva.
Danski bólkurin Drakomir framførdi leikin "Koldt" í Norðurlandahúsinum hóskvøldið.





# – Besti sjónleikafestivalur nakrantíð

NEATA FESTIVLAUR
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Í gjárkvøldið var seinasta sýning á NEATA sjónleikafestivalinum, sum hevur verið í Havn síðstu vikuna.

Hilmar Joensen, formaður í MáF, ið hevur skipað fyri festivalinum er sera væl nøgdur.

– Um vit skulu trúgva tí, ið luttakararnir og leiðarar hava sagt, so er hetta tann besti NEATA festivalurin, ið hevur verið.

Hilmar Joensen hevur sæð allar leikirnar á festivalinum.

– Allir vóru øgiliga góðir, samstundis sum teir vóru sera ymiskir.

Hilmar Joensen sigur, at allir leikirnir høvdu sera høga góðsku. Sjálvt um hann ikki dugir at siga, hvønn leik honum dámdi best, dregur hann fram, at íslendsku leikirnir altíð eru í eini dimensjón fyri seg sjálvar.

– Íslendski leikurin "Memento mori" var á sera høgum støði.

Men framførslan av "Hørpurímu" í gjár heldur hann eisini vera ótrúliga góða, bæði tí at hon skapti nakrar góðar myndir, og tí at tey tosaðu ígjøgnum tónleik.

NEATA festivalur verður aftur um tvey ár, tá verður hann í Riga í Lettlandi. Fyrireikingarnar til næsta festivalin eru longu farnar í gongd, og Hilmar Joensen sigur, at føroyskir áhugasjónleikarar eru byrjaði at gera ein bólk, ið fer at luttaka í Lettlandi.



*Hilmar Joensen, formaður í MáF: – Allir leikirnir vóru øgiliga góðir, samstundis sum teir vóru sera ymiskir*
*Mynd: Àlvur Haraldsen*